# Men Tobbi hevur jú rætt



FINNUR
HELMSDAL
løgtingsmaður

Havi verið burturstaddur, og havi tí ikki verið við í nøkrum orðaskifti, hvørki innan- ella uttanfloks, um fyrispurningin, sum Torbjørn Jacobsen hevur sett landsstýrismanninum, Jógvani á Lakjuni. Men lat meg siga beinanvegin, at eg haldi fyrispurningin vera meira enn viðkomandi, tí hann tekur støði í nøkrum so essentiellum, nevniliga at vit eru tjóð upp á 48.000 fólk hvør fremsta mál má og skal vera at gerast sjálvstøðug tjóð. Og um hetta mál skal røkkast, má og skal vera samsvar millum tær ovurhonds stóru íløgur vit gera í m.a. infrakerv, samferðslutól, sjúkrahús-, skúla- og aðrar bygningar og so nyttuna og gagnið, sum kann fáast burtur úr hesum. Tað gevur jú ongan meining, at vit bora hol eftir hol, uppi á landi og niðri í undirgrundini, at vit byggja flott sjúkrahús, stásiligar skúlabygningar, um fremsta endamálið við hesum er at gerast persónlig bringuprýði hjá lokalum politikarum ella flokkum. Vit bora og byggja fyri milliardir fyrst og fremst fyri at samskipa okkara ikki so øgiliga stóra land. Fyri at tey ymsu tilboðini á t.d. skúlaøkinum ikki vera eyðkend fyri meiningsleysar dupultfunktiónir men fyri menningarmøguleikar, góðsku og kappingarføri. Tí haldi eg tað er púra rætt, at eitt land við 48.000 fólkum bert hevur ein tekniskan skúla (í Klaksvík t.d.), sum so kann mennast við útbúgvingum upp móti verkfrøðingastøði, bert ein sjómansskúla (í Havn t.d.) o.s.fr. Kanska kann rættvísgerast, at tveir handilsskúlar eru í landinum, tá trýsti á hesar lestrargreinar er so mikið stórt.

**Kandidatútbúgving innan fiskivinnu**
Tá tað um gymnasialu útbúgvingarnar ræður, dugi eg illa at síggja hvørki fyrimunir ella meining við, at hesar verða nýttar sum eitt av okkara fremstu økismennandi átøkum. Gymnasilau útbúgvingarnar eru í dag so fjøltáttaðar og verða tað í enn størri mun, at tær eiga at verða savnaðar á fáum deplum. Tí gevur tað ikki meining at leggja eina tílíka í t.d. Vestmanna. Hetta skal als ikki skiljast soleiðis, at eg ikki virði og dugi at síggja góðskuna við Fiskivinnuskúlanum. Men hann liggur ov einsamallur í Vestmanna sum gymnasial útbúgving, og er tað neyvan skilagott í dagsins Føroyum at skipa eitt lítið fiskivinnufróðskaparsetur avsíðis í Vestmanna. Tað skilabesta hevði verið, at man kundi tikið fiskivinnu sum sergrein á einum av miðnámskúladeplunum. Tobbi skýtur upp á Kambsdali, og hví ikki tað. So kundu vit ístaðin nýtt ætlaðar íløgur og rakstrarútreiðslur til at styrkja okkara fróðskaparsetur við m.a. kandidatútbúgving innan fiskivinnu. Tobbi hevur í fyrispurninginum uppskot um, hvussu Norðurstreymur, Vágar og Sandoyggin kunnu økismennast við t.d. skúlatilboðum. Og eru hesi uppskot eins skilagóð og mesta av greinini er. Taki somuleiðis fult undir við at savna fleiri útbúgvingartilboð, so sum pedagog-, sjúkrasystra- og læraraútbúgvingina undir Fróðskaparsetrinum. Og skal miðnámsskúlin í Suðuroy sjálvsagt byggjast har, sum eitt samt ting hevur avgjørt at byggja hann, nevniliga í Vági.

**Ódámlig persónsálop**
Haldi fyrispurningurin hjá Tobba er so mikið skilagóður og viðkomandi, at vit áttu at nýtt grundhugsanina í honum sum frymil fyri, hvussu vit skipa okkara land. Haldi í veruleikanum, at fyrispurningurin er kanska tað mest frameftirlítandi skjal, eg havi sæð í longri tíð. Men heldur enn at ásanna hetta, nýta ávís innihaldið í skjalinum sum høvi til at persónsdálka høvundin. Og tað harmar meg. Og hetta harmar meg enn meira, tí Tobbi hevur allan rættin í tí, sum hann skrivar í nevnda fyrispurningi. Og so er innihaldið í honum, sum Tobbi sjálvur leggur dent á, eitt íkast í orðaskiftið um framtíðina á føroyska skúlaøkinum, og ikki nøkur endalig ætlan sum so.

Míni ráð til tjóðveldisfólk og allar aðrar føroyingar er: "Lesið fyrispurningin við opnum sinni. Hugsið síðan um, hvør grundleggjandi hugburðurin í honum er. Roynið síðan at ímynda tykkum, hvussu vit fáast best og mest gagn burtur úr risastóru íløgunum, vit hava gjørt í samferðslukervið o.a. Og leggið tykkum síðan í geyma, at vit, hóast fáment, hava allar møguleikar at gerast fræls tjóð, bert vit hugsa rætt og miðvíst. Og arbeiða rætt og miðvíst.

Tá tit hava gjørt tað, rokni eg við, at tit koma til ta niðurstøðu, at nú kann vera well, og at lokalu gamasjubuksurnar eru vorðnar nakað strammar. Tit ásanna, at nú er tíð, antin til at lata seg úr gamasjubuksunum ella til at klippa tær upp í síðunum. Ja, kanska skulu vit tora at ganga við berum lørum nøkur ár.

# Tað er ein vegur aftur

## Um vegaføringina í Leirvík o.a.



MARTIN
FJALLSTEIN

*– Sorrig og glæde de vandre til hobe*
*Lykke, ulykke de gange på rad*

Tað er nógvur politikkur til:
Tunnils- og vegapolitikkur
Grótpolitikkur
fíggjarpolitikkur
Umhvørvis- og
náttúrupolitikkur
Virðipolitikkur

Hyggja vit eftir Norðoyatunlinum og vegaføringini báðumegin, síggja vit, at allur hesin politikkur hevur verið í brúki. Tað eydnaðist at finna eina gongda leið við tunlinum, sum verður liðugur um fáar dagar. Ófært og sera gleðiligt. Ein nútímans tunnil, sum eftir øllum at døma fer at vera norðingum hentur og harvið okkum øllum.

Men vegaføringin í Klaksvík og Leirvík hevur ikki verið løtt at greiða. Tó hava klaksvíkingar loyst hetta á sín hátt, og vegaføringin er greið. Tað er ikki lætt. Væl ber til við tunnilsmunnan, men norðureftir verður býurin Stangamegin órógvaður av øktu ferðsluni.

Verri er Leirvíkarmegin. Fyrst noyddust teir at taka meginpartin av Bólagerði til arbeiðsveg, mold- og grótgoymslu. Síðan løgdu teir ein grótveg úr tunnilsmunnanum og allan vegin gjøgnum Kettuvík heim á Kráartanga. Nú bar til at flyta grót av Kráartanga inn í vánna í Klaksvík og at gera eitt stórt slættlendi út frá Kráartanga. Kettuvík av Enni og allan vegin heim við sínum tangum, skerum og søguligu støðum hvarv. Bygdarráðið hevur eisini avgjørt at brúka nakað av tunnilsgrótinum til at fylla út inni á Toftanesstøðni. Sanniliga her er grótpolitikkur við lít báðumegin fjørðin. Sama síggja vit út fyri ósanum í Kollafirði, á Sundi og mangar aðrar staðir. Líggjas í Bø yrkti: føroyingar eta mold. Men nú ert tað grót. Grót her og der og alle vegne.

Landsverk dugir væl at arbeiða við gróti. Teir gera snotuligar grótlaginar. Bæði við smágrót og stórum klettum. Hetta duga teir. Nýggi Kráartangi er eitt dømi. Sera snøgg laging. Víkin er innibyrgd við tveimum veldugum grótmolum. Fyrr var útsýni silvitni, sjóarfall og sjóarilska og stundum alfagur sólsetur. Nú er útsýni grefligir grótgarðar. Sjóarilskan er útihýst. Tó setir sólin enn í Djúpunum og kyrt er innan fyri garðarnar

**Men álavartos**
Leirvík er ikki bara Leirvík, men eitt dømi í nútíð og framtíð um, hvussu mál vera loyst politiskt og tekniskt havandi í huga øll tey sløg av politikki, sum nevnd eru omanfyri. Alt sum fer fram í Leirvík er so árent og ábart, at tað verður ein talandi, søguligur varði um hvussu mentað tjóð føroyingar vóru um 2000 – 2010.

Rætt skal vera rætt. Mangar staðir er farið um við hygni og skynsemi í torførum lendi. Peningur kann ikki vera til uppaftur betri loysnir allar staðir. Tað kundi verið vert at gjørt eitt katalog yvir støð, vega- og havnargerð, har væl er gingið um og væl er frágingið. Tíverri ber eisini til at gera eitt annað katalog, sum vísir, at stundum er reinur kleyvarskapur og óvilji uppií, so nógv er oyðilagt, sum kundi verið betur ógjørt t.d. inni í Kollafirði.

**Sorrig og glæde**
Saman við mongum øðrum havi eg fegnast um at Norðoyatunnilin verður gjørdur. Mong nýskapan man fara at standast av hesum nýggja vegi millum tær seks systrarnar eystanfyri og stórabeiggjarnar í miðøkinum, sum hava fingið so nógv til sín, sum allar hinar oyggjarnar máttu vera fyri uttan. Vónandi verður skjótt talan um annað enn handilskjarnar. Og um Havnin er sterkari magnetur enn Klaksvík. Vónandi verður tað so, at felags mentanarlív, vinnulív og handilslív mennist í stóra kjarnanum: Klaksvík, Leirvík, Gøta og Fuglafjørður. Hetta er alt glæde.

Men sorrig er tað sum hendir í Leirvík. Syndarligt. Ikki bert skandala, men skandalissimus. Bæði tað sum hendir millum landspolitikarar og bygdarráðið, tað sum hendir í bygdarráðnum og tað sum hendir á Víkini. Bygdin er troyttað av orðastríðið, løgtingssamtyktum, frágingnum samtyktum, ivasomum orðum hjá landsstýrismonnum og sjey uppskotum til vegaføring gjøgnum bygdina. Og so endar alt yvir á Bug. Bygdin er jarðløgd av Enni sunnanfyri og inn á Høvdan norðanfyri. So langt strekki við so nógvum søguligum støðum finnur tú ikki aðrar staðir í Føroyum. Men alt fer undir grót. Hetta er náðileyst. Her skortar politikkur. Her er einans grót- og vegapolitikkur eftir. Her er eingin politikkur um virðir, náttúru, umhvørvi, vakurleika, siðsøgu og søgu.

At leggja vegin fram við fornminnum á Toftanesi, fram við bygdarkirkjuni, eftir "torginum" oman fyri Tavuna og so oman og tvørtur um Bugin út á Kráartanga er sum ein keisarligur straffur til eitt bygdarfólk, sum setti seg upp móti teimum, sum ráða fyri borgum. Hetta er órímuligt, ósømiligt og er farin tíð.

**Sessist við sama borð**
Mytan sigur at Kallur og Konan eystanfyri bóðu gudin koma inn fyri Borð at gera sáttmála. Tey gjørdu avtalu um Viðin, Fuglin og Svíni (marsvíni), um luftina, jørðina og havi. Hiðani stava nøvnini Kalsoy, Kunoy, Borðoy, Viðoy, Svínoy og Fugloy. Men lat tað liggja.

Nú ræður um at konan í Leirvik og kallur í Havn stevna til fundar og sessast aftur við sama borð at gera nýggja avtalu. Bygdarráðsfrúan í Leirvík og Bjarni Djurholm landsstýrismaður noyðast at finna haldgóða loysn, har øll politisk sjónarmið verða tikin við.

**Venja og loysnir**
Nú fer ferðslan at ganga eftir vegnum, sum longu er tøkur gjøgnum Leirvík. Ferandi fara at venjast við hesa vegføring. Fólk og myndugleikar fara at eygleiða hvussu tað riggar. Hvussu nógvur ampi stendst av hesum. Onkru fer at meta um, hvussu nógv skal til fyri at hetta eisini verður framtíðarvegføringin. Gyrðingar, snyrlar og annað kann gerast, so ferðin ikki verður so nógv. Vegurin er har og Bólagerði er farið. Ja, hví ikki nýta hendan vegin, spyr onkur. So er málið loyst. Verður beinanvegin gjørt nakað álvarsamt við hesa vegføring, venja fólk seg við tað.

Hvør loysnin er hin rætta, dugi eg ikki at siga. Tunnil niðan fyri neystini er ein loysn. Tunnil í erva er ein onnur loysn. Men eg loyvi mær at vísa á tað, sum eftir mínum tykki er skeivt at gera. Tað er nevnt omanfyri. Bygdin og bygdarráðið skula saman við landsmyndugleikum finna haldgóðaloysn.

**Marina og torg**
Ein greinarøð um Víkina, Bugin og neystini er í Dimmalætting í aprílmánað. Í henni verður greitt frá staðarnøvnum, søgu og siðsøgu fram við víkini av Kráartanga og inn á Toftanes. Hetta er søga.

Tá ið eg komi til bygdar, síggi eg fyri mær at stóra slættlendi oman fyri Tavuna verður gjørt til eitt vakurt torg. Tavan verjir væl niðanfyri og veggurin kundi verið fríðkaður. Sama inn móti Pakkhús-inum. Tí kann eingin landsvegur leggjast hendan vegin.

Neystini eru til lítið prýði longur. Bátur verður næstan ikki drigin. Men neyst skula vera og bátar er eitt must. Eftir at hava fylt út á Bugin og alla víkina í eini 75 ár, er tíðin komin til at taka okkurt uppaftur. Nú er so kyrt at ymist kann ruddast burtur, sum fyrr var neyðugt. Endamálið skal vera at snøgga, fríðka og gera eina fitta báta-, lystbáta- og kajakkhavn, ella –vág. Gera eina vá/marina við atløguplássum, vegføring framvið og snøggum neystum á landi. Fólk kunna leasa/leiga/keypa sær neyst. Fyrr átt fólk ikki neystagrund, men bert neystið. Onkur av hesum nýggju neystum kundu hýst øðrum endamáli.

Men skal hetta vera framtíðarmusikkur, ber ikki til at leggja ein landsveg tvørtur um Bugin. Antin má hann liggja fram við landi ella far undir heilt herniðri. Tað ræður um at gera okkurt, sum fríðkar og mildnar teir tungu grótmolarnar. Innan fyri teir er nú ein vág, har børn og ung kunna rógva við smábátum og kajakkum, seta segl á jollur o.a. Tað verður spennandi at síggja, hvør politikkur verður lagdur á Buginum. Møguleikarnir eru mangir. Summir destruktivir, aðrir konstruktivir.

**Til lukku og góða eydnu**
Lat meg ikki troytta tykkum. Tað er einki forgjørt í at seta nøkur sjónarmið fram og tað havi eg gjørt. So er tað ikki ógjørt. Ein og hvør annar kann gera tað sama. Nú er bert eftir at ynska norðingum og øllum ferandi til lukku við nýggja tunlinum. Gævi hann verður øllum til frama.